

## Søguligur Inter-sigur

Oddaliðið í italsku Seriu A, Inter Milan, var aftur í einum klassa fyri seg í vikuskiftinum. Teir møttu Torino á útivølli, og fyri 12. ferð á rað í eydnaðist Inter at vinna ein Seriu A dyst. Við 12 sigrum á rað hevur Inter tikið metið fyri mest vunnar dystir á rað í bestu italsku deildini. Úrslitið av dystinum gjørdist annars 3-1 til Inter. Fyrst legði Adriano Inter á odda. Seinni javnaði Torino við málið frá Stefano Fiore, men gleðin var stokkurt. Lítla løtu seinni legði Zlatan Ibrahimovic Inter aftur á odda, áðrenn Marco Materazzi slóg sigurin fastan, tá hann skoraði uppá brotsspark ímóti endanum á dystinum.

## Liverpool nærum selt

Íleggjarar úr Dubai eru til reiðar at leggja einar fimm mia kr. á borðið fyri enska stórfelagið, Liverpool. Tosið hevur leingi gingið um, at Dubai International Capital, sum hevur onkrar av heimsins ríkastu monnum aftan fyri seg, skal keypa felagið, og nú váttar stjórin í Liverpool, Rick Parry, tíðindini.

- Báðir partar hava arbeitt hart við hesum. Beint nú verður juridiski parturin fingin í rættlag, og eg rokn ivið, at vit hava nakað ítøkiligt at siga hampuliga skjótt, sigur Parry við BBC.

# Eitt føroyskt unikum

**Tveir sigrar í donsku skakliguni sendu rating-talið upp um 2400, og so kann Helgi Dam Ziska rópa seg altjóða meistara**

TALV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Enn eru tíðindini ikki váttað alment, men tað skuldi verið púrasta víst. Eftir tveir sigrar í donsku skakliguni um vikuskiftið, er rating-talið hjá Helga Dam Ziska kropið røttu megin tey 2400, sum eru kravd, um Helgi skal sleppa at seta eitt IM framman fyri navn sítt, tá telvað verður í framtíðini.

Undan hesum hevði Helgi longu vunnið sær teir tríggjar IM-normarnir, sum eisini eru IM-krav, og síðani hevur bert rating-talið restað.

Sigrarnir um vikuskiftið vórðu fingnir til høldar móti telvarum við ávikavist 2237 og 2217 í rating, og hetta skuldi verið nóg mikið hjá Helga, siga serkøn innan talvítróttina.

Rating tølini verða ikki alment kunngjørd enn, men hóast tað skuldi gingið av skriðjuni næstu talvini hjá Helga, so hevur hann nú verið oman fyri tey 2400, og tí er einki at ivast í, at hansara navn stendur á listanum, tá FIDE seinast í januar mánaði fer at útnevna nýggjar IM- og GM-telvarar.

### Eitt unikum

Og tað hevur veruliga vakt ans, at Føroyar nú hava ein telvara, sum bara 16 ára gamal hevur vunnið sær IM-heitið.

Talvkøn siga, at verður sæð burtur frá norska Magnus Carlsen, sum verður mettur sum kanska størsta talvtalentið í heiminum, so er Helgi í dag helst sterkasta norðurlendska kortið, um hugt verður nøkur ár fram.

Og at hann í Danmark eisini er á liðnum hjá seksfaldu DM-vinnarunum úr Helsinge, sigur nú heldur ikki einki um styrki hansara við borðið. Og úr einum føroyskum sjónarhorni er so eisini hugaligt at staðfesta, at eisini John Arni Nielssen er at finna á liðnum hjá Helsinge.

## B71 liðformaðurin skal spæla við TB

**Um vikuskiftið hevur TB skrivað sáttmála við Bergleif Sólsker, sum hevur verið miðverji og liðformaður hjá B71, og við tveir aðrar spælarar**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*

TB er av álvara farið undir at fyrireika seg til enn eina roynd at vinna uppflyting í Formula deildina í fótbólti. Í vikuskiftinum hava teir skrivað undir sáttmála við tríggjar spælarar, veit Suðuroyar portalurin at siga.

Ein teirra, Dan Mortensen, var ein part av síðsta kappingarári á TB liðnum. Hinir báðir eru nýggir spælarar á Sevmýri. Annar teirra er Hartmann Hansen úr Vági, og hin er Bergleif Sólsker.

Serliga merkisvert er tað, at Bergleif Sólsker nú fer at spæla við TB. Bergleif hevur spælt við B71, sum eftir uppflytingina í heyst skal royna seg í bestu deildini. Bergleif Sólsker hevur talst millum stuðulsspælararnar hjá B71. Hann hevur verið miðverji og trý tey seinastu árini liðformaður.

Nú skal B71 royna seg í bestu deildini, men Bergleif Sólsker verður altso framvegis í næstbestu deildini.

Kyndil-Neistin 21-23 (8-12):

# Neistin aftur á rætta kós

**Neistin vnn grannauppgerðina ímóti Kyndli í Sunset deildini hjá kvinnum, men tað leikaði hart á hjá teimum bláu neistakvinnunum**

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Bæði Kyndil og Neistin fingu ein rættan framman á, tá fyrru hálvfinalurnar í Coca Cola-kappingini vóru á skránni fyri fáum døgum síðani. Nú skuldu bæði royna at fáa gongd á aftur spælið, men Neistin mátti metast at vera favorittur undan dystinum, tí stigatalvan vísir, at Neistin liggur á øðrum plássi, meðan Kyndil er at finna á fjórða plássi.

### Neistin legði betur fyri

Fyrstu løtuna var annars einki, sum týddi uppá, at Neistin var komin yvir lemjandi tapið í Coca Cola-kappingini, tí Kyndil var nevniliga liðið, sum byrjaði betur. Fyrstu løtuna høvdu tær grøna ótrúliga gott tak á Neistanum í verjuni, og eftir góðar 10 minuttir hevði Neistin bert fingið eitt mál.

Sum hálvleikurin leið, kom Neistin tó betur við í dystin. Tær vunnu seg fyrst upp á javnleik, og móti endanum av fyrra hálvleiki fingu tær ordiliga glið á spælið. Somikið væl, at trygg leiðsla varð vunnin undan steðginum.



*Kyndil-Neistin kv: Tað eydnaðist Neistanum at fáa uppreisn eftir keðiliga tapið fyri Stjørnuni í steyoakappingini týskvøldið. Tað var tó um reppið, at Kyndil fekk annað stigið*

### Kyndil var líka við

Í byrjanini av seinna hálvleiki fylgdust liðini væl at, men um miðjan hálvleikin fekk Kyndil gongd á spælið. Nú skoraðu tær fleiri mál á rað, og Neistin tóktist knappliga at hava stórar trupulleikar. Tá góðir 10 minuttir vóru eftir at spæla, eydnaðist tað hjá Kyndli at javna, og tá fimm minuttir restaðu av dystinum, fór Kyndil fram um Neistan fyri fyrstu ferð í seinna hálvleiki. Nú sá ikki gott út hjá Neistanum, men tær blivu tó við at kempa, og at enda eydnaðist eisini teimum bláu neistakvinnunum at vinna dystin við tveimum málum.

Tað leikaði tó hart á síðstu løtuna hjá Neistanum, sum mátti stríðast til síðstu kvinnu fyri at fáa sigurin í hús.

**FAKTA**

**Kyndil-Neistin 21-23 (8-12)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Lina Andriulyte 10 (1), Anja Heinadóttir 4, Ronja M. Mikkelsen 4, Randi Wardum 2 (1), Jórun Ludvig 1
**Neistin:** Nicoleta R. Hansen 10 (2) Katja Eigemann 4 (1), Elin Stakksund 2, Unn Kragesten 2, Gunnvá Brockie 2, Heidi Maria Akselsen 2, Annika Thomsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, Neistin 4
**Útvísingar:** Kyndil 3, Neistin 5
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum